# Til minnis um
# Petrinu Kristensen


*Petrina og Jentoft*

Jóladag andaðist Petrina Kristensen á røktarheiminum Vinterbylle í Stensved í Danmark, 86 ára gomul.

Við jarðarferðina, sum var frá Vesturkirkjuni týsdagin 5. januar, segði Bergur D. Joensen prestur m.a.: Petrina varð fødd og vaks upp á Tvøroyri, dóttir Charles Hauritz úr Kolding í Danmark, og Jettu fødd Jespersen av Tvøroyri.

Petrina fór tíðliga út at arbeiða, og trúliga helt hon á at stríðast alt lív sítt. Hon byrjaði mangan dagin at vaska fisk og turka á fiskaplássunum hjá Thomsen keypmanni. Eisini var hon hjá Mortensen. Umframt tað gjørdi hon mat til brúdleyp, føðingardagar og konfirmatiónir. Hon arbeiddi um dagin og tók sær av børnunum og tí húsliga, tá hon kom heim. Hon seymaði sjálv tey pløgg, sum børnini gingu í.

Petrina giftist Jentoft Kristensen, úr Finsnes í Norra tann 7. januar í 1947.

Petrina átti tilsamans níggju børn. Trý børn átti hon, áðrenn hon kom saman við Jentoft. Tey vóru Inger, Magdalenu og Nyborg. Petrina og Jentoft fingu síðan seks børn: Synøvu, sum andaðist bara 9 mánaðar gomul, Charles, Synøvu, Lilly, Jentoft og Johnny.

Fyrstu árini búðu tey á Tvøroyri, til tey í 1949 fluttu til Havnar. Jentoft koyrdi tá ørindi fyri Hotel Skarv í Havn. Tey fóru so aftur til Tvøroyrar fyrst í 50-unum, og komu so aftur til Havnar at búgva miðskeiðis í 50-unum.

Jentoft var bilførari í Havn í mong ár. Tað eru helst mong sum minnast, at hann í mong ár koyrdi á bilstøðini Akstur Bil.

Petrina fekk fiskaarbeiði á Bacalao. Um kvøldarnar var hon støðdama, fyrst hjá Taxa, so hjá Akstur Bil. Eisini vaskaði hon umborð á DFDS-skipunum og umborð á skipum hjá Standferðsluni - serliga Smyrli og Rituni.

Hon gavst seinni á Bacalao og var burturav støðdama hjá Akstur Bil og vaskaði umborð á skipum. Hon vaskaði í eini 35 ár, sum eisini var hennara lívsstarv. Eitt skifti var Petrina álitiskvinna í Havnar Arbeiðskvinnufelag. Hon var eisini virkin í Javnaðarflokkinum og var t.d. ofta við til at reka fólk á val.

Tá ið Jentoft, maður hennara, doyði 58 ára gamal í 1979, flutti Petrina til Danmarkar at búgva. Nú hon andaðist, átti hon 25 ommubørn, 53 langommubørn og fýra oldurommubørn.

*-red*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Georg Otthamar, løgreglumaður**, andaðist á Landssjúkrahúsinum 5. januar, 54 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum fríggjakvøldið kl. 18 heim í Ebenezer. Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin kl. 13.

**Sámal Mikkelsen, Klaksvík**, andaðist mikudagin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 82 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrshúsi heim í Betesda leygardagin kl. 18. Jarðaferðin verður úr Betesda sunnudagin kl. 13. Tey, ið ynskja at senda blómur ella krans kunnu í staðin lata Zarepta ella Sambýlinum í Bøgøtu eina peningagávu. Konta í Norðoya Sparikassa.

**Lydia Kruse, Tvøroyri**, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi 5. januar, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13 frá Salem.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum okkara,
at elskaði maður og pápi okkara

**Georg Otthamar**
løgreglumaður
Tórshavn

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin,
54 ára gamal.
Bønarhald verður í kapellinum á Landssjúkrahúsinum
fríggjadagin kl. 18.
Jarðarferðin verður úr Ebenezer leygardagin kl. 13.

**Christa**
**Gunnbjørn, Anna Helena og Bogi**

## Tøkk

Øllum tykkum, sum mintust og sýndu fastur okkara

**Sannu Mariu K. Johansen**

tann seinasta heiðurin at fylgja henni, takka vit hjartaliga.

*Vegna tey avvarðandi*
**Bette og Ingigerð**

# 75 ár síðan Elvis varð føddur



Í dag 8. januar eru 75 ár liðin síðan Elvis Presley varð føddur í Tupelo, Mississippi, í USA.

Sum 13 ára gamal flutti Elvis saman við familjuni til Memphis, Tennessee. Hann byrjaði sína tónleikakarrieru í 1954 og fekk sítt gjøgnumbrot tvey ár seinni við m.a. filminum “Love Me Tender” í 1956.

Elvis Presley ella „King of Rock and Roll“, sum hann eisini bleiv nevndur, gjørdist helst kendasta tónleikanavn í heimssøguni. Elvis andaðist 16. august 1977, 42 ára gamal.

*-red*

# Vild med dans í Føroyum



Jens Werner frá “Vild med dans”, og konan Anette Werner, koma enn einaferð til Føroyar at undirvísa í dansi. Hesaferð verður tað 5. og 6. februar 2010 á Hotel Føroyum. Talan verður um undirvísing fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Tað er Martin Brodersen frá wellness.fo, sum stendur fyri tiltakinum í Føroyum. Tilmeldingarfreistin er sett til 25. januar á adressuni: wellness@wellness.fo. Martin sigur, at tað eru longu fleiri, sum hava teknað seg til undirvísingina.

*Jens Werner*

## Merkisdagar

**75 ára føðingardagur**
Tann 19. januar fyllir Sofus Boesen í Froðba 75 ár. Dagurin verur hildin á Høvdanum í Froðba leygardagin tann 16..01.10 kl 19.00 Øll eru hjartaliga vælkomin. Tilmelding á tlf. 372634 áðrenn 10 januar.

**Gullbrúdleyp**
9. januar 2010 hava hjúnini Arndis og Eli Davidsen, Møllemarksvej 28, 4291 Ruds Vedby, gullbrúðleyp. Dagurin verður hildin saman við næstringum, vinum og kenningum í Reerslev Forsamlings-húsi frá kl. 15.00.

**Gullbrúdleyp**
10. januar hava hjúnini Jastrid og Árni Olsen í Haldórsvík gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Avhaldshúsinum í Haldórsvík leygardagin tann 9. januar kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
12. januar hava hjúnini Magdalena og Jákup Martin Joensen í Oyndarfirði gullbrúlleyp. Dagurin verður hildin í skúlanum í Oyndarfirði tann 16. jan. kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 16. jan kl 13 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Jóhanna Dahl Sørensen Norðdepil og Rasmus Magnusson Innan Glyvur. Eftir vígsluna verður receptión á Klaksvíkar Sjómansskúla frá kl 14-17, har øll eru hjartaliga vælkomin. Veitslan verður fyri innbodnum í Róðrarneystinum í Árnafirði kl. 19.

**Prógv**
Tann 16. desember 2009 stóð Rakul Napoleonsdóttir Joensen prógv sum cand. mag. í norðurlendskum máli og bókmentum við Aarhus Universitet.